# Samsvar má vera ímillum inngjald og útgjald

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Ein ávís kapping er farin í gongd millum politikarar, um hvør hevur verið fittastur ímóti pensjónistunum. Nógv verður gjørt burturúr, fyri at selja seg sum tann, sum hevur gjørt mest á tí økinum, og ikki minst verður víst á, hvussu lítið øll hini hava gjørt. Tað ljóðar næstan sum ein gávubúð, har eingin skal gjalda inn, meðan øll kunnu fáa út.

Nú er tað soleiðis við øllum pengakassum, at teir kunnu ikki gjalda meira út, enn tað sum fyrst er goldið inn. Soleiðis er eisini við teimum almennu kassunum.

Politikarum dámar væl at vísa á, hvussu nógv teir hava gjørt, fyri at fáa hesi ymisku útgjaldini at hækka, men ofta verður gloymt, at vit hækka ikki útgjaldið meira enn tað, sum onkur annar skal gjalda meira inn. Tí kunnu vit ikki einans hyggja eftir tørvinum hjá teimum sum skulu hava útgjøld. Vit mugu eisini hyggja eftir, hvønn týdning hækkaðu útgjøldini fáa fyri tey, sum skulu gjalda inn í kassan.

**Fólkapensjónin**

Fólkapensjónin er ein skipan, sum gongur ígjøgnum "stórapott". Øll sum arbeiða, gjalda inn, og øll í pensjónsaldri fáa út.

Stórar ábøtur eru gjørdar á hesa skipan tey seinnu árini. Hans Pauli Strøm vil vera við, at tað er einans honum og Javnaðarflokkinum fyri at takka. Hesum eri eg ikki samdur í, tí eingin flokkur ella persónur kann gera nakað einsamallur. Men tá tað er sagt, so skal Hans Pauli sjálvsagt hava rós fyri tað arbeiðið, sum hann hevur lagt eftir seg á hesum økinum.

**Tey flestu eru nøgd**

Flestu pensjónistar, sum eg tosi við, siga, at tey liva væl av fólkapensjónini og "Samhaldsfasta". Men sjálvandi eru øll ikki líka væl fyri. Onkur skal brúka nógvar pengar til heilivág o.s.fr. og tað kann broyta hesa myndina nógv.

Vit kunnu saktans hækka pensjónirnar nógv afturat, og uttan iva unna øll pensjónistunum so góð lívskor sum yvirhøvur gjørligt, men vit mugu minnast til, at hetta merkir, at tey sum eru úti á arbeiðsmarknaðinum skulu gjalda tilsvarandi meira í skatti. Og her mugu vit ikki gloyma, at stórur partur av arbeiðarunum í Føroyum eru fólk, sum standa í millióna skuld og tí helst eru verri fyri enn nógvir pensjónistar. Tað verða tey sum sleppa at gjalda hækkaða útgjaldið.

Vit mugu ansa eftir, at vit ikki geva teimum sum tørva, við at taka frá teimum, sum kanska tørva uppaftur meira.

**Pensjónsaldurin**

Arbeitt verður í løtuni við eini nýggjari pensjónsskipan og í tí smabandinum er spurningurin um pensjónsaldur reistur. Skulu vit halda fast við 67 ár, ella skulu vit niður á 65 ár, ella skulu vit longur uppeftir?

Vit kunnu saktans lækka pensjónsaldurin við fleiri árum, men vit mugu vera greið yvir, at fyri hvørt árið, sum pensjónsaldurin lækkar, missir pensjónsuppsparing eitt ár í inngjaldi og harumframt skal gjaldast út í eitt ár longri. Tað vil siga, at pensjónsuppsparingin missir í roynd og veru tvey ár fyri hvørt árið, sum vit lækka pensjónsaldurin, og tað merkir, at árliga útgjaldið verður munandi minni. Tað haldi eg at øll gloyma í hesum kjakinum.

Tað er sjálvur grundtankin við nýggju pensjónsskipanini, at jú longri vit rinda inn, meira fáa vit út, og jú seinni vit byrjar at fáa út, meira fáa vit hvørt árið. Hetta er "einføld matematikk".

**Hvussu leingi skulu vit arbeiða?**

Okkara ommur og abbar byrjaðu at arbeiða, tá tey vóru 14 ár. Tey arbeiddu til tey vóru 67, og meðallivialdurin tá var umleið 70 ár. Tað vil siga, at tað vóru bara eini 17 ár av teirra lívi, at tey ikki arbeiddu.

Í dag er vanligt at útbúgva seg til ein nærkast 30 ára aldri, og livialdurin er hækkaður nógv. Um ein persónur livir í 90 ár, og bara arbeiðir frá tí at hann er 30 til hann er 65 ár, so hevur hann bara 35 ár á arbeiðsmarknaðinum, meðan tað eru 55 ár av hansara lívi, at hann ikki arbeiðir. Í 25 ár skal hann liva av pensjónini, sum hann spardi upp tey 35 árini, hann arbeiddi. Verður tað ikki ov lítið at liva av? Arbeiðir hann harafturímóti til hann er 70 ár, so skal hann liva í 20 ár av pensjónini, sum hann spardi upp í 40 ár. Tað gevur eitt heilt annað býti.

**Munnkurv**

Eg eri ein av teimum, sum sita í politiska fylgibólkinum, sum skal hava fingið munnkurv, so eg fari ikki at koma við nøkrum uppskoti her um, hvussu pensjónsuppskotið eigur at síggja út, tá tað einaferð verður liðugt. Í einum slíkum máli eiga allir flokkar at finna eina breiða semju, og tí gevur tað onga meining, um nú øll skulu út at selja uppskotið sum sítt egna, ella sum nakað, tey ikki eru partur av. Vit mugu finna eina breiða semju, sum allir politiskir flokkar kunnu standa saman um.

Men eg skrivi hesar reglur fyri at vísa á, at uttan iva vilja øll veita pensjónistunum so góðar sømdir sum til ber, men roknistykkið má so ella so hanga saman.

# Sjúklingar og sjúkrahús tola ikki skilaleysar sparingar

HANS PAULI STRØM
løgtingsmaður



Landssjúkrahúsið var fyri ógvisligum ágangi til fyri einum tveimum árum síðani. Síðani hevur eydnast við ein felags ódnartakið í góðum samstarvið millum starvsfólk, leiðslu og politiska myndugleikan at venda gongdini til eina positiva menning – fyrst og fremst til gagns fyri sjúklingar, men eisini sum gevandi arbeiðspláss fyri starvsfólkini og teirra heilsufakliga førleika.

Hetta hendir, samstundis sum rationaliseringar og umleggingar verða gjørdar fyri at tálma útreiðsluvøkstrinum, so at sjúkrahúsið er ógviliga hart spent – ja til tað ýtarsta, fyri at kunna halda tørn.

Skal Landssjúkrahúsið nú haraftrat til at fremja stórar sparingar uppá 5-6 mió bara fyri tað sum er eftir av hesum árinum, fer tað at fáa ógvisligar avleiðingar fyri sjúklingarnar, og tað verður til óbótaligan skaða fyri sjúkrahúsið, tí at alt fer fyri skeyti, sum er eydnast at byggja upp hesi seinni árini.

Snøgt sagt: hvørki sjúklingarnir ella sjúkrahúsið tola tær skerjingar, sum eru uppá tal:

Bert bráðfeingis viðgerðir verða gjørdar, so bíðilistar verða longdir við meir enn einum árið, til stóran heilsuligan skaða fyri sjúklingar og stórar persónligar og samfelagsligar meirútreiðslur.

Vælgrundað ónøgd og trýst frá sjúklingum, sum ikki sleppa í viðgerð, verður ógvisligt, bæði móti sjúkrahúsverkinum og ikki minst móti politisku skipanini.

Landssjúkrahúsið kemur í vanda fyri at missa rættin sum útbúgvingarstað fyri yngri læknar og kommunulæknar, tí virksemið verður skert niður um tað markið, sum Heilsustýrið setir sum minsta krav.

Landssjúkrahúsið sum mennandi arbeiðspláss sindrast, við stórari ónøgd millum starvsfólk og oyðileggjandi avleiðingum fyri fasthalda og rekruttera starvsfólk við neyðugari servitan og førleikum.

Av hesum orsøkum gerast sparingarnar fullkomiliga skilaleysar – og avleiðingarnar rættast ikki uppaftur í bræði.

Tí eri eg glaður fyri, at vit bæði mánakvøldið og týskvøldið hava hoyrt og lisið eitt og annað frá sentralum persónum í samgonguni – um tað ber til at siga tað soleiðis – sum gevur eina ávísa vón.

Eina vón um at landsstýri og løgting sissa seg og játta sjúkrahúsinum teir fíggjarligu karmarnar, sum krevjast fyri at vit skulu kunna tryggja okkara borgarum neyðugar sjúkuviðgerðir og heilsutænastur, sum ein av teim altavgerandi fyritreytunum fyri at vit kunnu búgva í hesum landi.

# Einaveldi

BERGLJÓT MADSEN

Ofta havi eg undrast á, og onkuntíð ógvast við, tá eg havi fylgt við, seinast í samband við avdúkingarnar, nú hann leggur frá sær, hvussu lætt spæl borgarstjórin á Sandi hevur havt. Hann tykist mestsum at hava verið einaráðandi.

Hvussu fær ein persónur slíka makt? Vit liva í einum demokratiskum landi, har hvør einstakur frítt kann koma fram við síni meting og meining, uttan at vera bangin fyri avleiðingunum. Og kortini hendir tað, sum nú á Sandi, at ein maður sleppur at taka maktina, onkuntíð eisini so týðiliga til egnan persónligan fordeil, uttan at nakar talar at.

Í grundini er tað natturligt, serliga í einu lítlum samfelag sum í eini bygd, at tú kann vera bangin fyri avleiðingum fyri teg og tíni. Men tað er so umráðandi, at vit standa saman um fólkaræðið, soleiðis at tað virkar eftir ætlanini, at talað verður at, tá orsøk er til tess, og at vit ongantíð loyva einaveldinum.

# Veljarakanningin

Nýggj veljarakanning, ið Fynd hevur staðið fyri, vísir, at Javnaðarflokkurin missir alsamt fleiri atkvøður, og hevði verið val í dag, hevði hann bert fingið 14,7% av atkvøðunum. Flestar atkvøður fær Sambandsflokkurin. Hvat sigur hetta okkum? At ørkymlaðu Javnaðarfólkini flýggja til Sambandsflokkin? Hví fara frá einum sosialdemokratiskum flokki yvir í ein borgarligan flokk? Hvat sigur hetta um Javnaðarflokkin? Stjórnmálafrøðingur heldur, at flokkurin er á veg til uppløysing – flokkurin hevur mist seg sjálvan burtur millum tvær borgarligar kempur, og hugsjónarliga kumpassin snurrar vesalliga báðar vegir, tá ið hon ikki stendur still. Men ikki skuldi tað verið neyðugt at ofra virðini og grulva høgrumegin miðlinjuna. Hví koma hesi javnaðarfólk ikki til Tjóðveldi? Er tað ein spurningur um tryggleika, har øll, ið ikki eru tjóðveldisfólk mestsum av sær sjálvum detta inn um gátt hjá Sambandinum? Ella sigur hetta nakað um Tjóðveldi? Er Tjóðveldi farið ov langt burtur frá síni samhaldsføstu hugsjón? Av og á er tað sunt hjá øllum politiskum flokkum at líta inneftir og smyrja hjólini í mekanismuni.

Tað tykist, sum eru tað fá, ið velja sambandið orsakað av borgarligum hugsjónum. Heldur stendur Sambandsflokkurin sum súmbolski mótpartur Tjóðveldis. Men samband í sær sjálvum er ikki ein politikkur, heldur ikki eitt mál: tað er status quo, og um ein fyrrverandi javnaðarveljari ger av at seta X við lista B, kann sigast, at hann ongantíð brendi fyri javnaðarhugsjónini. Veruleikin er tann, at Javnaðarflokkurin ikki hevur ein miðvísan politikk longur, og sostatt fara gamlir veljarar beint yvir til Sambandið, har heldur eingin veruligur politikkur er.

Sambandssinnaðu javnaðarfólkini er longu farin í sambandsgrøvina. Nú bjóðar Unga Tjóðveldið teimum fullveldissinnaðu javnaðarfólkunum vælkomnum at stuðla tjóðveldishugsjónini, *har vit øll gjalda í felag og eftir førimuni*.

**Landsnevnd Unga Tjóðveldisins**